Jóhannis Joensen
løgtingsmaður

Nr. 38/2020

Fyrispurningur eftir Tingskipanini § 52 a

Fyrispurningur viðvíkjandi eftirliti við føroyskum og útlendskum fiskiskipum, settur landsstýrismanninum við fiskivinnumálum Jacobi Vestergaard (at svara skrivliga eftir TS § 52 a)

1. Kann landsstýrismaðurin upplýsa, um tað er eftirlit við føroyskum fiskiskipum í Barentshavninum og um so er, hvussu hetta er skipað og hvør rindar?
2. Kann landsstýrismaðurin upplýsa, um tað er eftirlit við útlendskum fiskiskipum í føroyskum sjógvi, og um so er, hvussu hetta er skipað og hvør rindar?
3. Heldur landsstýrismaðurin, at tað er tørvur á at herða eftirlitið við útlenskum fiskiskipum, sum fiska á okkara leiðum? Um so er, hvussu nógv hægri játtan skal til fyri at hava nøktandi eftirlit í føroyskum sjógvi?

Viðmerkingar

Fiskiveiðuavtalurnar við fremmandar tjóðir eru sera týdningarmiklar fyri okkara veiðumøguleikar í útlendskum sjógvi. Í hesum millumtjóðasamstarvi innan fiskivinnu troyta m.a. russar, norðmenn og íslendingar okkara sjóøki sum býti fyri, at vit troyta teirra sjóøki.

Tá slíkar avtalur verða gjørdar, er neyðugt at hava eftirlit við, um avtalurnar verða hildnar, skulu vit tryggja okkum, at býtið er rættvíst; at nøgd og fongur samsvara við tað, sum er avtalað.

Fyri at fáa betri innlit í viðurskiftini viðvíkjandi eftirliti við ávikavist føroyskum og útlendskum fiskiskipum, verður hesin fyrispurningur settur landstýrismanninum.

Á Løgtingi, 3. november 2020

Jóhannis Joensen